# HEILSANIR



**Elsku Jóhann Bech**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardeginum 12. apríl.
**Ynskja Bjartmar, babba og mamma**



**Góði Jóhann**
Okur ynskja tær hjartaliga tillukku við 6 ára føðingar-degnum 12. apríl. Nú er tú ein stórur drongur. Eisini ein heilsan til Bjartmar.
**Frá fastur og gubbanum á Hólinum**



**Góði Ovi**
Hvør skuldi trúð at hesin sjeikurin verður 40 ár í dag. Hjartaliga tillukku.
**Vit í Nýggjagerði**



**Góði fitti Høgni**
Hjartaliga tillukku við 19 ára føðingardegnum, sum er páskadag. Fittur altíð tú er. Jesus pápi signi lívsleið tína. Tey allarbestu ynski frá okkum her norðuri.
**Abbi og omma**



**Góði Benjamin**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum 9. apríl. Vit elska teg so nógv.
**Mamma og Ronja**

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnumorgun kl. 11: Breyðbróting. Týskvøld kl. 20: Bønar- og upp-byggingarmøti.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Oddur á Lakjuni talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Møti við Manskórinum í Thabor verður fríggjakvøldið 10. apríl kl.18.
Einki møti verður tann 12. apríl, men víst verður til páskastevnuna á Skála.

**Hebron í Leirvík**
Mikukvøldið kl.19.30: Bøn, læra og samfelag.

**Soli deo Gloria**
2. páskadag kl 18.00 møti v/ Kristoffur Olsen.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Mikukvøldið kl. 20.00 er bønarmøti.
Eingi møtir um páskirnar vegna páskastevnuna í Kelduni.
Hvønn gerandismorgun kl.6:15 er morgunbøn

**Fugloy**
Leygardagin.kl.20.00 Møti verður í kirkjuni á Kirkju við Pól Johannessen. Hugnaløta við drekka, spurnarkapping o.a verður eftir møti.
Páskadag kl.12. Gudstænasta á Kirkju við Pól Jóhannessen
Páskadag kl.17. Gudstænasta í Hattarvík við Pól Johannessen
Øll hjartaliga vælkomin

**Samfelagsmøtini á Tvøroyri á páskum**
Skírishósdag byrja vit við bønarmøti í Salem kl. 20.
Langafríggjadag verða møtini í ítróttarhøllini kl. 16 og 19.
Leygarkvøldið, páskaaftan, í ítróttarhøllini kl. 20.
Páskadag breyðbróting í Salem kl. 11.
Páskadag verða møtini í ítróttarhøllini kl. 16 og 19
Eftir møtini páskaaftan og páskakvøld verður hugnaløta fyri tey ungu úti í Salem.
Ein góður møguleiki at koma saman at hoyra tann góða boðskapin.
Eisini verður nógvur góður sangur og tonleikur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Samkoman í Salem*

**Behtel, Vágur**
Skírisdag og Langafríggjadag: Onki møti vegna sam-felagsmøtir á Tvøroyri
Páskadag:
Kl. 11 Breyðbróting
Onki møti seinni vegna samfelagsmøtir á Tvøroyri
2. páskadag
Kl. 18 Evangeliskt møti

**Frelsunarherurin, Vágur**
**Páskamøtir**
Skírisdag kl 18.00 møti.
langafríggjadag kl 11.00 morgunmøti kl 18.00 møti leydardagin kl 21.00 syngið við.
Páskadag kl 09.00 páskafrøi, við gudstænastu aftaná.
2. páskadag kl.09.00 morgunmøti. Kl 18.00 evang møti. Vit fáa vitjan av Finnboga og Jacobinu. Dortheu og Jensiu.Sofus og Eriku. Streingjakórið og eitt manskór. Øll eru vælkomin.

**Páskastevna verður í Missiónshúsinum í Porkeri**
*í døgunum 9-13 apríl.*
Møtini verða øll kvøldini kl. 18, tó páskaaftan verður møti kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Pensionistafelagið í Havn**
Limirnir koma saman í losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst.
Telefon: 22 27 33
E-mail:
finnurj@post.olivant.fo

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Gongutúrar hjá Felagnum Tórshavn á páskum**
9. apríl, skírhósdag:Velbastaðhálur – Kongavarðar. Farið verður kl. 14 av Norðasta Horni við busssteðgistaðið.
13. apríl, 2. páskadag: Rulla páskaregg í Kúrdali. Farið verður av Tórsbreyt kl. 14.30.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur runt Eystnes verður 13. apríl (annan páskadag).
Vit byrja við Gjónna í Æðuvík kl. 14 og enda við gamla prestagarðin á Nesi. Frásøgumaður verður Jógvan Ingvard Olsen.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 09.00 - 17.00
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 2. páskadagur stongt
Túrur: 22. apríl kl. 13.30 verður farið úr Steinatúni til Vestmannar at síggja tann nýggja Fiskivinnuskúlan.
Ein drekkamunnur verður í Fjørðukrønni. Aftur í Havnini kl. 17.00. Tilmelding: 316491.
Kosrnaður 120,- - Gjaldast mánadagin 20. apríl
Týsdagur
kl. 10.00 Vit syngja . Simme Jacobsen, Fróði Sandoy og Tummas Mikael Smith
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 "Gev tað víðari"
Sunvá Kass, frá felags-skapinum Agape.fo í Føroyum
Mikudagur
kl. 09 - 12 Maskinbinding v/ Maritu Guttesen
09 - 12 Veving v/ Joanu Bjarnastein
09 – 12 Bindiklubbur
09 - 12 Horn- og beinarbeiði Rasmus Nygaard
Støkk inn á gólvið um hetta hevur tín áhuga
15.00 Túrur: Inn á Gøtu - Stórutjørn
Randi og Elisabeth, fysioterapeutar
Øll eru hjartaliga vælkomin
Hósdagur
10.00 Fimleikur, Grethe Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin
Vit lesa: "Bitterfittan" Maria Svetland
Hittast 7. mai kl. 11.00
14.00 Boccia í kjallaranum
Alma Poulsen
16.15 Linedans
Mia, Arnfríð og Jørgin

Fríggjadagur
09.00 – Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Fimleikur

Dánjal Húsgarð
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin*

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnakvøld 3. páskadag kl. 19

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
Vit hittast aftur mikudagin eftir páskir. Góðar páskir.

**Dagtilhaldið á Toftum**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag frá kl 15.00-18.00. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Ein drekkamuður er altíð og tú kanst lesa tey seinastu bløðini.

**Eldrafelagið Nón - Opið hús**
Eldrafelagið Nón hevur opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Gøtubrá Eysturkommuna**
opið er
týsdag 15 - 18
hósdag 15 - 18
Um tørvur er á bili, kann ringjast til tlf. 441720 helst áðrenn kl. 12

**Luffustova**
Opið frá kl. 15.00-18.00.
Vit byrja aftur týsdagin 13. januar.
Týsdag: Fimleikur
Mikudagur: Ítriv
Hósdagur: Telda
Øll eldri eru vælkomin.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið Sóljan**
***Klaksvíksvegur 35***
***Klaksvík · tlf. 459091***
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, for-mannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndar-limunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Sjálvhjálpin**
tlf. 280005 mán.-fríggjadag kl.12-16 og mik. 16-18.Sí meira á www.sjalvhjalpin.fo

**Sinnisbati**
hevur aðalfund mánakvøldið 9. mars 2009, kl. 19.00 í "Áarstovu", Tórshavn (við síðuna av íslendsku sendistovuni) Inngong frá Gongini. Skrá sambært lógini. Nærri verður lýst seinni.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur:
heilaf@post.olivant.fo

**Sandoyar Kunningarstova**
Mørkin Mikla 3kj
FO - 210 Sandur
Tel. 361836, fax 361256
www.visitsandoy.fo
sandinfo@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mánadag - fríggjadag kl. 13 - 16.

**Listasavnið á Sandi**
Listasavnið á Sandi er opið hvønn sunnudag kl. 14-16.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keyp-mannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktion-ellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt mikukvøld kl. 20 og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghús-vegur 37.